# rðin til Klaksvíkar

fyri á leið fýra vikum síðani. Men sjálvt um bert ein vika er til sjálva frumframførsluna, er ongin stórvegis fjáltur at hóma á Eyð Matras. Avbjóðingin til hendan leikin er annars ein av teimum stóru. Eyð er ikki bara einsamøll um at fylla tann út við hálvan annan tíma, ið leikurin varðir. Eisini skal hon skifta ímillum ikki færri enn 35 smærri leiklutir umframt leiklutin sum Aina Cederblom.

- Tað er ikki soleiðis, at eg skal seta meg inn í og spæla so nógvar leiklutir. Smærru leiklutirnir eru meir ein máti at dríva søguna fram og lýsa Ainu Cederblom, sigur Eyð, sum viðgongur, at tað eru ávísir vansar við at vera einasti leikari.

- Vanliga er ferðin í einum leiki nógv tengd at samanspælinum við viðleikararnar. Slíkar havi eg ikki her, og tí má eg ansa eftir, at eg ikki skundi mær ov nógv, men lati persónarnar fáa tað pláss, teir skulu hava, sigur Eyð Matras.

Hesum ber leikstjórin tó ongan ótta fyri. Hon heldur tað nevniliga vera eitt privilegium at sleppa at arbeiða saman við ein so dugnaligum sjónleikara sum Eyð Matras.

## Tætt samstarv

Samstundis viðgongur Sigrun Valbergsdóttir, at hon ivast í, um hon hevði átikið sær eina slíka uppgávu saman við einum leikara, hon ikki kendi. Tað sigur seg sjálvt, at í einum einrøðuleiki sum hesum, arbeiða leikstjórin og leikarin óvanliga tætt saman. Tað er ikki pláss fyri at troyttast av hvørjum øðrum, tí ein tann mest týðandi uppgávan er nettup at geva hvørjum øðrum meir orku, greiðir Sigrun Valbergsdóttir frá.

- Tað er ófatiligt, at Eyð hevur tol við ein leikstjóra, sum ikki dugir føroyskt serliga væl, bendir annaðhvørt orð skeivt og javnan má steðga á fyri at finna rætta orðið, sum skal siga henni, hvat eg vil hava hana at gera, flennir íslendska Sigrun Valbergsdóttir.

Tí er hon sera fegin um, at Eyð Matras eftirhondini skilur heitt fitt av íslendskum.

## Fakta




Íslendski leikstjórin Sigrun Valbergsdóttir hevur skrivað handritið til leikin "Sjóvevur", ið byggir á bókina hjá Ainu Cederblom Som sjøluffarer på Atlanten.
Eyð Matras, sjónleikari, hevur týtt handritið til føroyskt.
Leikurin er liður í 100 ára hátíðarhaldinum hjá Kalksvíkar Kommunu
"Sjóvevur" verður frumsýndur 7. februar í Leikalund.

Hugskot: Eyð Matras
Leikstjóri: Sigrun Valbergsdóttir
Leikari: Eyð Matras
Pallmynd: Edward Fuglø
Tónleikur: Magni Husgaard
Ljós: Árni Baldvinsson

Fá meir at vita um leikin á heimasíðuni www.eymaleik.com

## Frá venjingunum í Leikalund

*Myndir: Høgni Thomsen*





